## Bjørndalen setti nýtt met

Norski Ole Einar Bjørndalen slapp ígjøgnum alt kensluregistarið, áðrenn hann í gjár fekk staðfest sítt 12. HM-heiti í skíðskjóting. Bjørndalen vann upprunaliga kappingina, men saman við níggju øðrum luttakarunum fylgdi hann ikki heilt neyvt ætlaðu rutuni, og hetta fingu teir í fyrsta umfari ein revsiminutt fyri. Seinni varð revsingin tó strikað, og so kundi Bjørndalen staðfesta, at hann er tann skíðskjúttin í heiminum, sum hevur vunnið flest HM-heiti. Samstunds var talan um World-Cup sigur nummar 86 hjá honum. Eitt tal, sum bert Ingemar Stenmark áður hevur rokkið.



## James setti nýtt met

David James spældi sín dyst nummar 536 í Premier League, tá Portsmouth um vikuskiftið vann 2-0 á Manchester City. Talan er um dystarmet fyri Premier League, síðani besta enska deildin varð umskipað í 1992. James, sum nú er 38 ára gamal, spældi við longu fyrsta árið, og nú 17 ár seinni er hann framvegis fastur fúsur, tá farið verður á ensku vøllirnar.

# Greiddu setningin



*Stjørnan hevði ikki stórvegis trupulleikar av Kyndli í dystinum sunnudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Bæði Stjørnan og VB greiddu sínar setningar, tá tey sunnudagin spældu móti ávíkavist Kyndli og StÍF.

Í báðum førunum arg-aðu botnliðini tó nakað fyri steðgin, men tá ferðin varð sett upp, kom munur á, soleiðis at talan gjørdist um hampuliga greiðar sigrar.

Stjørnan hevur longu mest sum tryggjað sær sína atgongd til FM-finalurnar, meðan VB nú er í knallharðari kapprenning við Tjaldur og Neistan um seinna plássið.

### FAKTA um dystirnar

**Kyndil-Stjørnan 21-28 (12-13)**
10 min: 3-6
20 min: 6-8
40 min: 14-17
50 min: 18-24
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Jacklin Durhuus 11(4), Jórun Ludvig 3, Randi Wardum 2(1), Ása Christiansen 2, Beinta Laursen 2, Linda Johannesen 1
**Stjørnan:** Simona Petersen 11(2), Bára S. Klakstein 4, Maria við Neyst 3, Durita Mikkelsen 2, Joan M. Djordjevic 2, Dianne Møller 2, Ella Petersen 1, Anna Kristina Samson 1, Una Olsen 1
**Brotskøst:** Kyndil 5, Stjørnan 2
**Útvísingar:** Kyndil 2
**Dómarar:** Kári Hansen & Sámal Paulason

**VB-StÍF 36-28 (17-14)**
10 min: 5-7
20 min: 10-10
40 min: 22-17
50 min: 28-21
**Málskjúttar**
**VB:** Aukse Vysniaskaite 12(2), Rannvá Johannesen 8, Daiva Toumaite 8(1), Svava Vestergaard 2, Gurið Mortensen 1, Una Egilsdóttir 1, Sára Samuelsen 1(1)
**StÍF:** Fríðrún Danielsen 7, Louisa Andreasen 6, Rebekka Justinussen 5(3), Anna Petersen 3, Ninna K. Johansen 3, Bára Berthelsen 2, Sunfríð Johansen 2
**Brotskøst:** VB 6, StÍF 4
**Útvísingar:** VB 2, StÍF 1
**Diskvalifikatión:** VB 1 (Beinleiðis reytt)
**Dómarar:** Birgir Sondum & Hanus Kúrberg

Tjaldur-Neistin 20-23 (8-12):

# Neista-verjan á finalukós

**Neistakvinnurnar stóðu ímóti stóru skjúttunum hjá Tjaldri, og nú eru tær bláu eitt fult so gott finaluboð sum bæði VB og Tjaldur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*Jakup@sosialurin.fo*

Eftir at tær við sigri á VB hildu fast um sínar vónir fyri at røkka FM-finaluni, styrktu Neistakvinnur sær um møguleikan, tá tær í gjár spældu útidyst móti Tjaldri.

Tvær ferðir hetta kappingarárið hava Neistin og Tjaldur spælt javnleik, men hesa ferð hevði havnarliðið uppskriftina uppá, hvussu Tjaldur skuldi skerjast.



*Tað var fyrst og fremst í verjuni, at Neistin vann dystin móti Tjaldri*

*savnsmynd*

### Verjan og ferðin

Og í so máta vóru tað serstakliga tveir lutir, sum vóru fullkomuliga avgerandi.

Verjuspælið hjá Neistanum var í løtum av dystinum til reint UG. Skotsterku bakspælararnir hjá Tjaldri fingu ongan tíð frið at stilla kanónirnar, og hóast Adina Petrea framvegis skeyt síni 10 mál í dystinum, so var greitt, at hon mátti nýta nógvar kreftir til hesi málini. Og tá hvørki Adina ella hinar av lyklaspælarunum hjá Tjaldri høvdu orkuna til veruliga at trýsta í 60 minuttir, so gekk sera striltið hjá Tjaldri at halda momentinum í dystinum alla tíðina. Ikki minst, tá Fríða Petersen hevði ein av sínum hampuliga góðu døgum.

Og hartil royndi Neistin eisini alla tíðina at seta nógva ferð á uppgerðina. Høvdu tær minsta møguleikan, so runnu tær kontra, og dentur varð alla tíðina lagdur á, at spælið skuldi setast skjótt ígongd, soleiðis at verjan hjá Tjaldri varð stressað.

### Kreftirnar rukku ikki

Kanska høvdu Neistavenjararnir lurtað eftir tí, sum Henrik Gerster segði seinasta vikuskiftið, tá hann og Stjørnan høvdu vunnið steypakappingina.

Í øllum førum var avleiðingin av konstant høgu leikferðini so neyvt tann sama hesaferð, sum hon var í finaluni. Fyrsta korterið av dystinum og fyrsta korterið eftir steðgin gekk annars heilt væl hjá Tjaldri, men tá kreftirnar gingu undan, vildi mest sum einki bera til.

Neistin vann soleiðis seinna korterið av fyrra hálvleiki 8-1, og seinna korterið av seinna hálvleiki vunnu gestirnir 8-3. Eitt greitt tekin um, at kropsliga er Tjaldur ikki heilt ført fyri at standa seg ígjøgnum 60 minuttir, um ferðin verður sett upp, og enn hevur liðið ikki ein bonk, sum í nóg stóran mun kann avlasta tær, sum eru inni á vøllinum.

Tann fyrimunin hevði Neistin, sum støðugt skifti nógv út, og sum tí ikki kom í neyð av vantandi orku, tá minuttirnir, ið eftir vóru á talvuni, fóru at fækkast.

### Finalan bíðar

Stóran part av hondbóltsárinum hevur finaluplássið verið ein spurningur, har Neistin ikki hevur havt tað heilt stóra orðið at siga.

Men í so máta er nú av álvara vent í holuni. Við sigrum á VB og Tjaldri er Neistin nú eitt fult so gott boð, sum nakar annar til sessin. Kravið er tó, at spælararnir nú taka at kalla hvønn dyst sum eina finalu, har vinnarin fer víðari og taparin er úti. Tað kynstrið dugdi Neistin í fjør, og í løtuni tykist liðið hava styrkina til at endurtaka tað kynstrið.

Tjaldur hevur hinvegin sín fyrimun, tí tær hava ein dyst móti Kyndli tilgóðar. Men tað verður í internu uppgerðunum, at toppurin verður avgjørdur, og tað man vera lítið álvuligt hjá Tjaldri at vita, at tær framvegis eiga á at spæla á útivølli móti bæði VB og Neistanum.

### FAKTA um dystin

**Tjaldur-Neistin 20-23 (8-12)**
10 min: 5-3
20 min: 7-8
40 min: 14-14
50 min: 15-17
**Málskjúttar**
**Tjaldur:** Adina Petrea 10(4), Annika Thomsen 4, Elinbjørg Hammer 2, Alina Anghel 2, Marinela Patru 2
**Neistin:** Trine Mayland 6(2), Annika Ljósstein 5, Nicoleta Radu Hansen 4, Tordis Tróndarson 3, Heidi Maria Akselsen 1, Unnu Danielsen 1, Stine Mikkelsen 1, Rakul Augustinussen 1, Elin Stakksund 1
**Brotskøst:** Tjaldur 4, Neistin 3
**Útvísingar:** Tjaldur 1, Neistin 6
**Dómarar:** Kristian Joensen & Karstin Joensen

# Eru ein eind nú

Fyri bara trimum vikum síðani mundu fá halda, at Neistakvinnur høvdu nakran serligan leiklut í stríðnum um røkka øðrum plássinum í FM-finaluni.

Í dag er støðan ein onnur, men sjálvar hava Neistakvinnurnar alla tíðina trúð upp á møguleikan, sigur Rakul Augustinussen.

- Vit trúgva alla tíðina upp á møguleikan. Vit hava bara tikið ein dyst í senn, og so royna vit at gera okkara besta. Nú hava vit so vunnið tríggjar dystir á rað, og so eru vit brádliga við aftur í toppinum, sigur Rakul Augustinussen.

Tveir av hesum dystunum hava verið móti VB og Tjaldri. Er rætta spælið nú við at vera har?

- Ja, tað haldi eg. Sjálvandi kann tað enn gerast betri, men nú virka vit sum eitt lið, og vit eru veruliga við at vera har. Í dag riggar verjan eisini væl, meðan hon ikki riggaði so væl seinast. Men Tjaldur og VB eru eisini tvey ymisk lið, sigur Rakul Augustinussen.

**-mørk**